## Ætla at steðga alistøð

Danski umhvørvisverndarfelagsskapurin Danmarks Naturfredningsforening (DN) er til reiðar at fara til Naturklagenævnet og Miljøklagenævnet fyri at forða fyri, at ein støð til at ala saltvatnsfisk verður gjørd í Hirtshals. Alistøðin skal sambært verkætlanini ala 3.250 tons av fiski um árið, og tað fer sambært DN at hava við sær, at støðin fer at koyra 110 tons av køvievni út í Skagerrak um árið. Til sammetingar nevnir DN, at tey 110 tonsini svaras til avfallið frá 38.000 svínum.

Danmarks Naturfredningsforening

## «Fiskets Gang» steðgar

Norska fiskivinnustýrið hevur gjørt av at steðga mánaðartíðarritinum «Fiskets Gang», sum er komið út síðani 1910. Avgerðin hjá stýrinum merkir kortini ikki, at lesararnir verða sleptir upp á fjall. Fiskivinnustýrið sigur, at haldararnir fara framvegis at fáa tíðindini, so í veruleikanum er tað bara navnið, sum fer í søguna. Síðani norska fiskirannsóknarstovan bleiv løgd undir fiskivinnustýrið, hevbur "Fiskets Gang" gjørt mest burtur úr fiskirannsóknum og øðrum rannsóknum innan fiskiskap.

# Føroyska byggivinnan ve

**Nú tað er gjørligt hjá íslendingum at koma til Føroya at arbeiða fyri minni løn, eru sinnini farin upp á kók hjá so at siga øllum, ið varða av arbeiðsmarknaðinum. Egon Joensen, samskipari hjá Føroya Handverksmeistarafelag, metir at øll byggivinnan sum hon er, er við at blíva upployst innanífrá, og at bíliga íslendska arbeiðsmegin í Føroyum kann mata alt burturundan føroyskari byggivinnuni og enntá spjaða seg til aðrar vinnur eisini. Hjá Samtaki eru meiningar tær somu, sum hjá arbeiðsgevarunum, og frá politiskari síðu er boðað til fundar um málið hósdagin**



*Johan Dahl, landsstýrismaður í Vinnumálum, var ongantíð serliga heitur fyri Hoyvíkssáttmálanum, men nú hevur hann møguleika sum landsstýrismaður í vinnumálum at rætta upp tað ójavnvág, sum nógv halda at sáttmálin hevur til fyrimuns fyri íslendingar*

LØNARTRÆTAN VIÐ ÍSLENDINGAR
*Leif Láadal*

Vit eru á sumri í 2009: Tríggir norðurlendskir starvsfelagar sita í einum kaffiskúri í Álakeri. Ein er dani, ein íslendingur og hin triði føroyingur. Allir tríggir arbeiða teir við at umvæla Landssjúkrahúsið. Íslendingurin, sum er timburmaður, arbeiðir við at klæða tann høga hvíta bygningin, meðan danin og føroyingurin, sum ávikavist eru múrari og elektrikari, arbeiða inni í bygninginum við at umvæla teir eisini.

Allir tríggir hava eina handverkaraútbúgving av umleið somu longd. Teir hava allir arbeitt í líka nógv ár við fakøki sínum, og allir eru arbeiðstakarar hjá størri felag.

Altso tykjast teir javnsettir í allar mátar. Men um vit hyggja at lønini hjá teimum trimum, eru teir rættiliga ólíkir. Og serliga er tað íslendingurin, sum skarar framúr við sínari lítlu løn í mun til hinar báðar. Íslendingurin fær, nú kursurin á íslendsku krónuni er serliga lágur í mun til donsku krónuna, eitt sindur minni enn helvtina av tí, sum hinir báðir fáa. Danin fær í hesum føri heldur meira enn føroyingurin, tí eins og føroyingar, tá teir arbeiða í øðrum norðurlandi, hevur danin ein ávísan samdøgursfrádrátt.

### Undirgravandi ávirkan

Nú er søgan omanfyri ein framtíðarsøga, og tískil ikki sonn – enn. Men um nakrar mánaðir verður hon veruleiki, tí tá byrjar arbeiðið upp á at umvæla Landssjúkrahúsið – eitt arbeiði, sum íslendsk fyritøka vann sær rættin til, tá tilboðini vórðu latin upp. Tað var enntá so, at tær tvær fyritøkurnar, sum høvdu næstog triðlægsta tilboðið upp á umvælingina, eisini vóru íslendskar.

Hvussu ber tað til? Jú, føroyingar hava ikki somu skipanir – tað vil siga lógarkrøv og treytir – sum okkara granni í útnyrðing, Ísland. Vit loyva nevniliga íslendingum at koma hendaveg at arbeiða fyri íslendskar arbeiðslønar-satsir, og nú kursurin á íslendsku krónuni er so lágur, hava íslendskar byggifyritøkur (og aðrar íslendskar fyritøkur fyri so vítt) stórar útreiðslufyrimunir, tá tilboð verða latin í Føroyum.

Hjá bæði føroyskum arbeiðsgevarum og arbeiðstakarum, skriða tey sær í nakkanum í hesum døgum. Hvat í Guðsgarði er gingið galið? Hvussu ber tað til, at vit eru endað í einari støðu, har útlendskir arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar hava eyðsýndar fyrimunir framum føroyingar á føroyska arbeiðsmarknaðinum?

Svarini upp á hesar spurningar eru við at koma undan kavi, og tey verða væntandi við til at fáa javnvág í aftur. Annars endar heilt galið, sum samskiparin hjá Føroya Handverksmeistarafelag ávarar ímóti:

– Støðan er fullkomiliga órættvís yvirfyri føroyskum arbeiðsgevarum og arbeiðstakarum, og verður ikki funnin ein loysn, eri eg harafturat bangin fyri, at bíliga íslendska arbeiðsmegin fer at spjaða seg út í aðrar vinnur enn byggivinnuna, sigur Egon Joensen.

– Vit hava seinnu árini sæð, at størri føroyskar byggifyritøkur hava megnað at tikið kappingina upp við danskar fyritøkur, sum annars ráddu fyri borgum á føroyska marknaðinum. Men nú sær út til at ein ella annar politiskur bukkur, sum er við til at undirgrava føroyska marknaðin, fer at kosta okkum alla hesa serfrøði, leggur hann afturat.

### Samtak skelkað

Hjá Samtaki, sum varðar av teimum stóru arbeiðarafeløgunum í Føroyum, er arbeiðsmarknaðar-ferðsluljósið farið frá grønum yvir í gult. Tað er ikki komið á reytt enn, men tað er ikki tí at støðan ikki er álvarslig. Tað er bara tí, at Samtak hevur eina vón og eitt inniligt ynski um at fáa bøtt upp á støðuna, tí sum Sonja Jógvansdóttir, samskipari hjá Samtak, spyr:

– Hvat í allari víðu verð skulu vit gera uppi í EFTA ella EBS, um vit ikki klára at seta eina lítlan millumlandasáttmála við Ísland saman, soleiðis at føroyingar ikki verða við sviðusoð?

Og har hava vit veruliga ein ræðandi tanka. Ímynda tær, at Føroyar fara fram eftir sama leisti, sum við Hoyvíkssáttmálanum, og avreiða alt ov illa gjøgnumhugsað lyftir til meginpartin av londunum í Evropa? Ímynda tær, at politiski meirilutin á tingi trumfar hálvhugsaðar loysnir ígjøgnum, sum Føroyar fáa meira enn torført við at sleppa sær burturúr, tá tað vísir seg, at føroyingar verða trælir í egnum landi? Ja, ímynda tær...

Tað kom sum ein bumba, tá tað frættist, at íslendingar høvdu vunnið útbjóðingina upp á umvælingina av Landssjúkrahúsinum, tí at felagið ið bjóðaði, slapp at løna sínum starvsfólkum út frá íslendskum arbeiðsmarknaðar-sáttmálum. Hjá Samviti fór alt maskinaríið í gongd, og felagið hevur millum annað sett seg væl og virðiliga inn í, hvussu íslendski arbeiðsmarknaðurin er settur saman.

### Strangastu krøv í Norðurlondum

Og tað er ikki løgið, at støðan í løtuni hevur fingið sinnini í Samtaki í kók, tí tað vísti seg, at íslendski arbeiðsmarknaðurin er hermetiskt stongdur fyri øllum, sum kann føra til mismun yvirfyri íslendskum arbeiðstakarum.

Ringu royndirnar av útlendingum, sum arbeiddu fyri lítið og lætt fyrst í hesi øldini, hava havt við sær, at íslendingar hava táttað í av álvara. Tað er ógjørligt at sleppa undan at betala útlendskum arbeiðsfólki í Íslandi minni enn sáttmálaásettu lønini, sum ein íslendingur fær fyri líknandi arbeiði.

– Vit kannaðu fleiri lond, harímillum Ísland, og tað vísi seg, at Ísland hevur eina av harðastu lóggávum á økinum, sigur Sonja Jógvansdóttir, samskipari

